HEILSANIR

Elskaða systir og mostir!
Hjartaliga tillukku við runda degnum tann 11. nov. Alt tað besta ynskja vit tær.
Heilsan vit við Svalbardsá

Góða, fitta Maia
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum.
Kærar heilsanir mamma og babba

Her er hon aftur!
Hvør skuldi trúð, at hendan daman er 30 ár? Hjartaliga tillukku við degnum alt tað besta í framtíðini.
Heilsan »tú veitst«

Góði Hugin Terje
Hjartaliga tillukku við 13 ára føðingardegnum ynskja vit tær.
Hjalte, Trygve og Bárður



Góði Hugin Terje
Hjartaliga tillukku við 13 ára føðingardegnum og alt gott í framtíðini. Klemm frá
mammu og Jan



Góði Andri
Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum 14. nov. Alt tað besta í framtíðini.
Kærar heilsanir Árni, mamma og babba

30,- kr. Sosialurin

Heilsanir

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..
....
....
....
....
....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ....
Bústaður: ....
Bygd/býur: .... Tlf.: ....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

Vága vinnufelag:

Høga gjaldið verður ein tollmúrur

– Prísurin fyri at nýta undirsjóvartunnilin er væl hægri enn vit høvdu væntað, og sera nógv hægri enn vit høvdu vónað. Tað sigur Heðin Poulsen, formaður í Vága Vinnufelag, ið metir, at høga gjaldið avgjørt er kappingaravlagandi fyri vinnuna í oynni

BUMMGJALD
Jón Brian Hvidtfeldt

Vinnulívið í Vágum tekur ikki væl ímóti gjaldinum, ið leiðslan fyri P/F Vágatunnilin nú loksins hevur sett fyri, hvat tað fer at kosta at nýta Vágatunnilin. Vinnulívið metir stutt sagt, at høga gjaldið fer at vera ein tollmúrur fyri vinnuna í Vágum.

- Eg má siga, at gjaldið er nógv væl hægri enn vit høvdu væntað, og so nógv hægri enn vit høvdu vónað. Tí eri eg sera skuffaður av kostnaðinum, sigur Heðin Poulsen, formaður fyri Vága Vinnufelag.

Hann vísir á, at høga gjaldið fer at merkja, at vinnulívið í Vágum fer ikki at fáa so lætt við at koma inn á marknaðin á meginøkinum, t.v.s. í Streymoynni og Eysturoynni.

- Sjálvandi er tað ein stórur bati, at vit í næstum fáa fast samband úr oynni. Tað sparir okkum bæði kostnaðarmikla bíðitíð, umframt at vinnan gerst meira fleksibul, tí vit nú ikki skulu laga okkum til ferðaætlanina hjá Strandferðsluni, sigur Heðin Poulsen.

Men batin gerst kortini ikki so stórur sum vinnan hevði væntað, og tað kemst av høga kostnaðinum fyri at nýta undirsjóvartunnilin. Tí er vinnan í Vágum framvegis nógv verri fyri enn vinnan á meginøkinum, sigur Heðin Poulsen.

- Tað er greitt, at tað verður at rokna sum ein tollmúrur fyri vinnuna, at vit skulu gjalda so nógv fyri at sleppa inn á meginøkið, sigur formaðurin í Vága Vinnufelag.

Vága Vinnufelag hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at politikarar eiga at hugsa um vinnuna í Vágum, ið jú hoyrir til útjaðaran, í sambandi við at Vágatunnilin verður tikin í nýtslu í næstum. Felagið hevur í tí sambandi heitt á landsstýrið um at gera eftir tilmælinum í økismenningarálitinum, sum sigur, at miðað eigur at verða eftir at fáa í lag eina gjaldsskipan fyri Vágatunnilin, ið ger, at vinnurekandi í Vága sýslu fara at nýta fasta sambandið í mest møguligan mun. Millum annað út frá hesum orðum í útoyggjaálitinum metir Vága Vinnufelag, at vinnan í Vágum eigur at sleppa at nýta Vágatunnilin fyri ein bíligari kostnað enn vinnan aðrastaðni úr landinum.

- Vit skilja væl, at leiðslan fyri P/F Vágatunnilin ikki tekur serlig atlit til vinnuna í Vágum – tað er heldur ikki uppgávan hjá henni. Men tí heita vit á politiska myndugleikan um at hugsa um tað, sum eitt nú stendur í útoyggjaálitinum, um at menna vinnuna í útjaðaranum, vísir Heðin Poulsen á. Hann heldur tí, at politikararnir eiga at lækka prísin fyri at nýta tunnilin, so vinnan í Vágum verður betur fyri, sammett við vinnuna á meginøkinum.

- Eitt av endamálunum við undirsjóvartunnlinum var jú, at vinnan í Vágum skuldi fáa betri umstøður at virka undir, so hon kann menna seg í kapping við vinnuna í restina av landinum. Men við høga nýtslugjaldinum, ið nú er ásett fyri at nýta tunnilin, verður hetta mál langt frá rokkið, sigur Heðin Poulsen, formaður í Vága Vinnufelag.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Handilskjarnin við egnari mótasýning

Mikukvøldið skipaðu handlarnir í Handilskjarnanum fyri eini mótasýning

MÓTASÝNING
Orð: Ingrid Bjarnastein
Myndir: Jens Kr. Vang

Mikukvøldið hevði Handilskjarnin eina mótasýning á hæddini, har damudeildin heldur til. Har var vetrarmótin sýndur fram, bæði til børn og vaksin, kvinnur og menn og eisini hvat ítrótti viðvíkur.

– Mótasýningin gekk fint, og øll eru væl nøgd við hana, sigur Óluva Dahl-Olsen, sum hevur skipað fyri mótasýningini saman við Mirjam Zachariassen.

Nógv fólk hevði leitað sær oman í Handilsskjarnan mikukvøldið og hølini vórðu næstan fullsett.

Tey, sum gingu til mótasýningina, brúktu ein kanska óvanligan hátt at koma inn upp á. Rullutrappurnar vórðu nýttar at ganga oman eftir, og síðani komu tey inn á tveir pallar á gólvinum.

– Vit valdu at gera okkara egnu mótasýning fyri at royna okkurt nýtt. Mett verður, at bygningurin er so stórur, at tað ber væl til at skipa fyri okkara egna, sigur Óluva.

Um tiltakið verður aftur á skránni veit Óluva Dahl-Olsen tó ikki at siga, men tað er væl møguligt.